# Blokkin á høvdið

**Ráðstevnan við tí lovandi navninum hevði fleiri spennandi røðarar at bjóða, men serliga eitt sera vánaligt politisk kjak gjørdi, at høvdið datt meira á bringuna enn á blokkin**

RÁÐSTEVNA/ UMMÆLI
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*




*Henrik Vestergaard, Venstre, og Marianne Jelved, Radikale Venstre, sótu í politikarar pallborðinum. Henrik Vestergaard er framsøgumaður í grønlendingamálum hjá Venstre, og hann tóktist ikki at vita so nógv um Føroyar. Marianne Jelved segði seg hava hug at tosa um at skipa blokkstuðulin øðrvísi.*

*Mynd: Heri á Rógvi*



*Formurin bilaði ikki. Jørn Astrup Hansen stórtrívdist á Christiansborg, og tað gjørdi áhoyrarafjøldini eisini, tá hann gav nøkur prik.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Tey komu úr øllum ættum. Summi við stórslignum starvsheitum og hóskandi búnum. Onnur komu sum tey einaferð vóru. Øll høvdu tey tað til felags, at dagliga yrkið gav teimum møguleika at vitja Christiansborg ein vanligan týsdag í apríl til eina ráðstevnu um búskap. Tey flestu føroyingar og grønlendingar. Og sjálvandi eisini vóru eisini fitt av dønum, onkur úr Ìslandi og eitt umboð fyri sendistovuna hjá Eritrea hevði á ein ella annan fingið fatanina av, at hetta var nakað fyri hann.

Norðuratlantsbólkurin hevur við at skipa seg sum bólk fingið hendur á einum munagóðum bita av játtanini til danska fólkatingið. So stórur er bitin, at týðandi politisk evni kunnu fáa eina gjølla viðgerð. Hesaferð var tað búskapurin, ið átti tørn. Skráin var eitt sindur ørkymlandi á at líta. Heitið var høvdið á blokkin, og sagt varð í kunnandi tilfarinum, at ráðstevnan fór at snúgva seg um føroyskan búskap. Røðararnir vóru nógvir. Bæði altjóða serfrøðingar og meira heimligar typur við holllari vitan greiddu frá, men tað var torført at fáa eyga á breiðu og nágreiniligu lýsingina av búskaparstøðuni, sum er neyðug, tá mann ger greitt, at endamálið er kunning, kunning og meira kunning. Tað var ógvuliga trupult at gera sær nakra heildarmynd av samanhangunum.

Tað er vert at nevna, at hugtók sum sjálvberandi búskapur at kalla ikki vóru at hoyra.

Á teimum næstu linjunum, eins og á teimum omanfyri, kunnu tygum lesa subjektivu metingina hjá undirritaða av ráðstevnuni. Aðrastaðni á hesum báðum síðum ber til at lesa meira objektivar frágreiðingar til tey ymsu evnini og ymsu røðarnar, ið vórðu uppi og vendu á ráðstevnuni.

## Så smukt

Fyri at siga tað so einfalt sum gjørligt, so var tað ikki so nógv galið við hesari meira ella minni politisku ráðstevnuni. Ikki annað enn politikararnir, altso. Og har vóru teir donsku politikararnir í serflokki at hála virðið á ráðstevnuni undir lágmarkið ta løtuna, teir luttóku. Politikararnir úr hinum pørtunum av ríkinum hava eisini staðið seg betri enn týsdagin, men í mun til donsku starvsbrøðurnar glógvaðu teir.

Umboð úr fýra donskum flokkum sótu við pallborðið. Seinni sama dag vóru týðandi politiskar tingingar skipanina av donskum kommunum í framtíðini. Og tað var kanska hetta torføra mál, sum var á huganum á donsku politikarunum. Ì øllum førum tóktist donsku politikararnir fjarir og ógvuliga óvitandi. Evnið hjá teimum var at røða um, hvat Danmark væntaði sær av blokkstuðulinum, og høvuðsevnið á ráðstevnuni var búskapur í ríkisfelagsskapinum í sambandi við rískisveitingar. Men tað var kortini bert Marianne Jelved úr Radikale Venstre, sum kortini hevði tað minsta av ítøkiligum viðmerkingum, og tað var eitt lyfti um tosa víðari og endurskoða. So var restin ein long røð av innantómum orðafellum um vakurleikan og styrkirnar í ríkisfelagsskapinum, sum, alt eftir politiskari yvirbevísing, kann tykist mikið skilagott, men í mun til evnið var tað burturvið.

Men teir føroysku og grønlendsku politikarnir høvdu eisini góðan hug at tosa um kenslir heldur enn tøl og blokk. Tað ber jú so grúiliga væl til at varðveita samstarv og brøðrabond sum sjálvstøðugir statir, ljóðaði tað ferð eftir ferð, um nakar skuldi ivast.

## Astrup rulaði

Tann so eyðkendi, næstan føroyski, bankastjórin í tí stóra bankanum í Føroyum, Jørn Astrup Hansen, er fastur fúsur, tá føroyska samfelagsgongdin seinnu árini skal lýsast. Tað er valla nakar, ið megnar at gera tað so gott sum Jørn Astrup. Hann byrjaði væl, men so gekk tað meira striltið. Hann virkaði ikki so væl fyri, sum mann kanska skuldi vænta. Men so var ikki. Tá hann hevði rist tey heldur turru hagtølini frá sær, byrjaði bankastjórin at bíta frá sær. Og hann hevði nógv at geva av.

Nógv fingu eitt prik. Eingin meira enn føroysku politikararnir. Ikki bert fyri teirra vantandi vilja at loyva pant í fiski- og aliloyvum, men tað er eisini - sambært Jørn Astrup Hansen - nakað lort við øllum hesum grunnunum og almennu partafeløgunum og vantandi privatiseringunum og alt møguligt annað, sum hann loyvdi sær at undrast yvir.

– Der sidder sådan et underligt slør i den færøske økonomi, segði Jørn Astrup Hansen millum annað.

## Turt kjak

Ráðstevnan varð hildin í stásiligum umhvørvi á Christiansborg frá klokkan níggju á morgni til nakað væl út á seinnapartin.

Tvær reisir var kjak við tveimum ymsum pallborðum. Og tað var næstan ikki til at halda út. Politikararnir megnaðu hegnisliga at kvala sína egna ráðstevnu við teirra gamla víni - í gomlum fløskum.

Høvdið rakti ongantíð rættiliga blokkin í tann mun, at vit fóru nógv avstað við vitan, men eins nógvari lítið týðandi sum hent vitan. Fleiri hildu upp á, at blokkstuðulin var av tí ónda, men tað var meira enn nakað annað av hugsjónarligum orsøkum og ikki so nógv við búskaparliga greiningum. Tað vóru mest orðingar sum "kann vera skaðiligt" og "ynskiligt at avtaka blokkin". Tað var kanska heldur ikki so undarligt, at fólk á einari ráðstevnu hjá loysingarsinnaða Norðuratlantsbólkurin ikki eru so glað fyri blokkstuðulin.

Og tunga kjakið gjørdi, at tað kendist meira sum at fáa blokkin á høvdið - men ongantíð endavendan.



*Felagssalurin á Christiansborg var karmur um ráðstevnuna um búskap og blokk.*

*Mynd: Norðuratlantsbólkurin*



# Trupult við egnum gjaldoyra

**Eitt føroyskt gjaldoyra fær tað trupult, líkamikið hvat tilknýtið verður til donsku krónuna, sigur Bodil Nyboe Andersen, stjóri fyri Danmarks Nationalbank**

RÁÐSTEVNA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Bodil Nyboe Andersen, stjóri fyri Danmarks Nationalbank, er ikki hvør sum helst í danska fíggjarheiminum, og hon ansar væl eftir, hvat hon sigur. Á ráðstevnuni greiddi hon frá um gjaldoyru.*

*Mynd: Norðuratlantsbólkurin.*

Tað verður dagliga ikki prátað serliga nógv um eitt møguligt føroyskt gjaldoyra. Hetta var eisini orsøkin til, at stjórin fyri Danmarks Nationalbank, Bodil Nyboe Andersen, vildi siga nakað um evnið. Eftir eina gjølla lýsing av gjaldoyraskipanini í danska ríkinum, hættaði hon sær at gera nakrar viðmerkingar til nakrar teoretiskar møguleikar í sambandi við stovnsetanina av einum møguligum føroyskum gjaldoya. Stjórin fyri Nationalbanken nýtir ikki nýmótans teldu-forrit, tá hon leggur fram. Og hon leggur ikki so nógv í, hvat fyrireikararnir ynskja at hon skal siga. Men boðskapurin er púra greiður. Tí sambært stjóranum fyri Nationalbanken, so kann eitt føroyskt gjaldoyra fáa tað trupult.

– Líkamikið hvat tilknýtið verður til donsku krónuna, so verður tað ein tungur burður at halda eitt føroyskt gjaldoyra á einum stabilum støði, sigur Bodil Nyboe Andersen. Orsøkin er einamest støddin á føroyska búskapinum.

## Tríggir møguleikar

Í stuttum ber til at siga, at ein skipan við einum møguligum "sjálvstøðugum" føroyskum gjaldoyra kann gerast upp á tríggjar mátar. Aðrar skipanir eru eisini møguligar, men tað eru serliga hesar tríggjar skipanirnar, sum eru galdandi. Eitt føroyskt gjaldoyra nýtist ikki at vera so nær tengt at loysingini, men kann eisini vera ein møguleiki, um Danmark velja evruna sum gjaldoyra.

Ein tann mest vanliga skipanin er ein skipan við einum føstum kursi. Hendan skipanin kann merkja eitt sokallað "currency board". Tað merkir í stuttum, at eitt møguligt føroyskt gjaldoyra kundi verið fastsett til donsku krónuna. Tað er kortini upp til ein føroyska landsbanka at verja føroyska gjaldoyra móti spekalatión. Bodil Nyboe Andersen metir, at eitt danskt statsgaranti vildi givið betri umstøður. Stjórin fyri Nationalbanken nevndi eisini møguleikan fyri einum "vanligum" fastkurs samstarvið, men hesa loysnina helt hon týðuliga ikki vera serliga hóskandi, tí búskapurin er so lítil, og ein tílík skipan er rættiliga krevjandi.

Møguleiki er eisini at hava eina skipan við sokallaðum "flótandi kursum". Hetta er ein skipan sum eins og vanliga fastkurs skipanin setir stór krøv til fíggjarpolitikkin, tí gjaldoyra skal stýrast við serliga rentuna. Royndir við tílíkum skipanum í smáum búskapi hava gingið serstakliga illa í hond, sigur Bodil Nyboe Andersen.

Ein triði møguleiki er eisini at "union" ella gjaldoyra samstarv, har tað stórt sæð er sum nú, men tað er ein teoretiskur møguleiki fyri, at ein størri partur av ábyrgdini av umsitiningi verður fluttur til Føroya, men tað virkaði á Bodil Nyboe Andersen at vera ógvuliga lítið sannlíkt..

## Konubrot

Hon ansar meira enn bert vanliga væl eftir ikki at blanda seg í nakað politiskt kjak ella at geva sínar politiskar meiningar til kennar.

Í danska búskaparheiminum er Bodil Nyboe Andersen ikki júst ein og hvør. Rætta heitið er formaður fyri stjórnina í Nationalbanken. Hetta starv hevur hon røkt síðani 1995, men gjørdist partur av ovastu leiðsluni í Nationalbanken í 1990.

Hon varð útbúgvin í búskaparfrøðingur í 1966, og hon byrjaði stutt eftir at undirvisa á Københavns Universitet. Har var hon til 1980, tá hon fór í starv í Andelsbanken og seinni koncernchef í Unibank.

Ì Danmark er hon ein ógvuliga nógv vird kvinna. Bæði sum undirvísari og stjórin er hon tiltikin.

## Meira í morgin

**Ráðstevnan "Høvdið á blokkin" rúmaði so mikið av nógv, at pláss varð ikki fyri øllum í blaðnum í dag. Ì morgin ber til at lesa meira um ráðstevnuna.**

# Útbúgving er lykilin

**Menniskjaligur kapitalur er tað týdningarmesta tilfeingið hjá Føroyum. Útbúgving og mening av vitanini verður avgerandi fyri, hvussu føroyski búskapurin fer at klára seg í framtíðini, sigur íslendski professarin Thorvaldur Gylfason**

RÁÐSTEVNA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Thorvaldur Gylfason er ikki í iva um, at lykilin til búskaparvøkstur í Føroyum er at satsa upp á útbúgving og menning av menniskjaligum kapitali.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Skal føroyski búskapurin menna seg sum best í framtíðini, gerst hetta best við at útbúgva fólk. Boðskapurin hjá íslendska professaranum í búskapi er greiður: Mest av øllum er neyðugt at menna menniskjaliga tilfeingið.

Thorvaldur Gylfason leggur stóran dent á, at hansara fatan av einari framtíðarmenning av búskapinum merkir, at munandi minni partur av búskapinum verður myndaður av teimum tí slagnum av arbeiði, sum krevur lítlan og onga útbúgving og í primeru vinnugreinunum.

– Tað er vitan, ið skal til fyri at skapa stóran vøkstur. Hetta síggja vit ferð eftir ferð dømi um. Tú skapar ikki nóg stóran vøkstur, og tað er ein stórur vandi fyri afturstigum við einari stóra óútbúnari arbeiðsmegi í afturgongdstíðum, sigur Thorvaldur Gylfason.

Hann nýtti serliga Írland sum dømi upp á ein búskap, har umfatandi vøkstur hevur merkt búskapin seinnu árini. Og hetta hongur ikki minst saman við, at nýggjar íløgur hava vent býtið av arbeiðsmegini frá næstan hundrað prosentum í landbúnaðin í øðrum primerum vinnum til vinnugreinir grundaðar at kalla bert á vitan.

At menna menniskjaliga kapitalin er ikki nóg mikið í sær sjálvum at tryggja búskaparvøkstur, leggur Thorvaldur dent á. Ein marknaðarbúskapur og møguleikar fyri so fríum handli sum gjørligt eru grundarlagið undir einum væl virkandi búskapi, sigur Thorvaldur Gylfason.

## Styrkja mentanina

Í Føroyum er støðan tann, at ein sera stórur partur av teimum, ið taka eina hægri útbúgving, leitað sær í onnur lond. Tey flestu fara til Danmarkar, men áhugin fyri øðrum londum er eisini voksin seinnu árini.

Vit spurdu íslendska professaran í búskapi, hvørt hetta kann gerast ein trupulleiki fyri menningina, sum hann metir vera avgerandi.

– Tvørturímóti er tað ein fyrimunur, at føroyingar útbúgva seg í øðrum londum. Tað kann vera sera læruríkt fyri tann einstaka at nema sær vitan á útbúgvingarstøðum, har støðið kanska er serliga høgt, sigur Thorvaldur Gylfason.

Íslendski búskaparfrøðingurin starvast í dag sum professari við lærda háskúlan í Íslandi. Men hann roynir á ongan hátt at halda fólk í Íslandi í útbúgvingartíðini.

– Eg eggi altíð mínum bestu næmingunum at fara uttanlands til góðar skúlar. Hetta eiga vit ikki at vera bangin fyri - heldur ikki í Føroyum, sigur Thorvaldur Gylfason, sum sjálvur hevur lisið á víðagitna Princeton háskúlanum í USA.

Ìslendski professarin hevur eisini eitt boð upp á, hvussu fólkið fæst aftur til landið, tá útbúgvingin er lokin.

– Tað er avgerandi at styrkja mentanina. Hetta skal skiljast soleiðis, at íløgur mugu gerast frá almennari síðu í mentanarlívið. Hetta er fyri at skapa trivna í landinum og fyri at fáa útnytta styrkirnar í landinum, sum jú ikki finnast aðrastaðni.

– Tú kanst ímynda tær, hvussu nógv betri tað hevði verið, um føroyingar høvdu nýtt bert ein lítlan brotpart av tí stuðulinum, ið varð latin fiskivinnuni í áttatiárunum til Sjónvarp Føroya, sigur Thorvaldur Gylfason, sum ávarar ímóti at undirmeta týdningin av mentanarligum íløgum.

## Íslendingar mennast og lána

Thorvaldur Gylfason nýtti stóran part av sínum fyrilestri á ráðstevnuni at greiða frá gongdini hjá íslendska búskapinum. Sum so mangur íslendingur leggur hann stóran dent á týdningin av, at Ísland loystu frá Danmark. Leiðin móti fullum sjálvstýri byrjaði av álvara í 1904, og komið var stórt sæð á mál í 1944. Frá 1900 til 2000 var vøksturin í íslendska búskapinum, máltur í BTÚ fyri hvønn íbúgva, 2,5% í miðal um árið.

Hesin vøksturin skyldast millum annað handil, útbúgving og onnur búskaparlig viðurskifti. Men íslendski búskapurin hevur tað ikki bara gott. Tí høga livistøðið er fíggjað serliga við lánsveitinginum og við langum arbeiðsvikum. Samlaða skuldin er í dag eini 150% av BTÙ. Tað vil siga, at samlaða framleiðslan í Ìslandi átjan mánaðir skal til fyri at rinda skuldina aftur.

– Vit liva yvir evni, staðfestir Thorvaldur Gylfason.

## Víðagitin

Thorvaldur Gylfason er sum nevnt professari við lærda háskúlan í Reykjavík. Hann er ein viðurkendur og nógv lisin í búskaparfrøðingur, ið ger seg galdandi í fleiri altjóða høpum. Sum nevnt varð hann útbúgvin á Princeton. Àðrenn hann fór aftur til Ìslands, hevur hann millum annað starvast hjá IMF í Washington og undirvíst á hægri háskúlan í Evropa og í USA.

Hann ger seg regluliga galdandi í íslendska kjakinum. Frettablaðið hýsir einaferð um vikuna hansara viðmerkingum til ymisk viðurskifti, og hann skrivar eisini javnan í øðrum bløðum og í altjóða búskaparligum tíðarritum. Eisini hevur hann skrivað bøkur á bæði íslendskum, enskum og svenskum. Thorvaldur Gylfason fyllir 53 ár í juli.